# ssin



*Hóast NSÍ royndi at trýsta eftir steðgin, so varð hetta fyri tað mesta gjørt við høgum diagonal-sendingum móti HB-verjuni, sum ikki hevði teir heilt stóru trupulleikarnar av hesum*
Mynd: Álvur Haraldsen

Nakrar ferðir royndi HB eisini at liggja framvið í kviku mótálopunum, og um miðjan hálvleikin varð spenningurin fullkomuliga tikin úr dystinum við í øllum førum vakrasta málinum hetta kvøldið. Rókur spældi sera elegant Jákup á Borg leysan við hælinum, og ikki minni elegant sendi Jákup við vinstra beini bóltin í tríkantin uttan nakran sum helst møguleika hjá Jens Martini.

Nakað seinni pyntaði NSÍ um úrslitið, tá Helgi var seinastur á einum bólti, sum hevði ferðast nakað aftur og fram í brotsteiginum, men meira enn tað sama gjørdist talan ongantíð um.

### Bara heimasigrar

Við sigrinum flutti HB seg upp á oddasessin, har teir við betri málmuni otaðu seg fram um grannarnar í B36.

Tað er tó merkisvert, at HB enn ikki hevur fingið stig uttan fyri Havnina. Einasta stigið, sum higartil er komið á útivølli er tað, sum spurdist burtur úr javnleikinum móti B36. Fyrr ella seinni, so plaga HB'arnir tó at koma ígongd av álvara, og tí man verandi útgangsstøði á talvuni vera hugagóður lesnaður hjá viðhaldsfólkunum - heimasigrar ella ikki. Komandi vikuskifti skal HB royna seg á Sevmýri, og tað er ein dystur, sum í ár tykist at fáa nakað av tí spenningi, sum hann hevði í gomlum døgum.

Hjá NSÍ merkti tapið eitt lítið afturstig á talvuni, har teir annars høvdu møguleikan at koma heilt fram í oddin. Komandi vikuskifti skulu teir aftur vitja í Havn, tá B36 tekur ímóti. Tann dystin vann NSÍ í fyrstu royndini hetta kappingarárið, og verður talan um eina endurtøku sunnudagin, so eru vespurnar hóast alt heilt væl við.

## Fakta um dystin

**HB-NSÍ 3-1 (2-0)**
1-0: Hans á Lag, 40.
2-0: Rókur Jespersen, 45.
3-0: Jákup á Borg, 71.
3-1: Helgi L. Petersen, 80.
Dómari: Georg Rasmussen. Hevði hug at missa linjuna eina løtu, men fekk tó fatur á rætta endanum aftur.
HB: Bárður Johannesen - Hallur Danielsen (Vagnur M. Mortensen, 63.), Jóhannis Joensen, Rasmus Nolsøe, Janus M. Joensen - Jákup á Borg, Svenn Fuglø Jacobesen, Kári Nielsen, Tór-Ingar Akselsen (John Heri Dam, 75.) - Hans á Lag, Rókur Jespersen
GK: Hans á Lag, 41., Rasmus Nolsøe, 56.
NSÍ: Jens Martin Knudsen - Brynjálvur Nielsen, Óli Hansen, Viggo Johannesen (Jústnes H. Hansen, 74.), Einar Hansen - Andy Olsen, Helgi L. Petersen, Jústnes R. Hansen, Jónstein Petersen (Sjúrður Jacobsen, 65.) - Dánjal Hansen, Christin Høgni Jacobsen
GK: Einar Hansen, 69.

ars fríspark frammarlaga í høgru, men hetta varð beint úr aftur HB-verjuni. Bóltúrin varð sendur langt niðan, og tá Jónstein, sum annars tóktist hava fult tamarhald á støðuni, als ikki traff bóltin, kundi Rókur púrasta einsamallur við Jens Martini senda í netið. Stór frøi á HB-áskoðarum, og sjálvandi eitt bakkast av teimum heilt stóru hjá NSÍ.

### Ein perla í keðiligum hálvleiki

Viðvíkjandi undirhaldi á vøllinum, so vóru fyrru trý korterini nakað væl betri, enn seinni hálvleikur gjørdist.

Partvíst, so var longu givið, hvussu fortreytirnar at spæla vóru. Skuldi NSÍ hava nakað burturúr, so vóru teir noyddir at leypa á, meðan HB hinvegin kundi halda seg til kontraspælið, sum teir vanliga megna so sera væl.

Fyri spenningin, so gjørdist talan tó í alt og lítlan mun um nakað veruliga skipað NSÍ-trýst. Ístaðin, so hildu teir seg fyri tað nógva til at senda høgar diagonal-bóltar inn í verjuna, har Jóhannis Joensen mest sum hvørja ferð var hægstur. Tær fáu ferðirnar, at roynt var at sleppa at baklinjuni umvegis kantarnar, vóru eisini tær ferðirnar, at HB-verjan varð mest strongd, men opnar møguleikar gjørdist talan tó heldur ikki um so øgiliga ofta.

## Formel 1 í Sjónvarpi Føroya

Eftir áheitanir frá lesarum vendu vit okkum til stjóran í almennu loftmiðlunum Jógvan Jespersen, fyri at spyrja. um Sjónvarp Føroya við nýggju leiðsluni eisini fór at skifta kós viðvíkjandi formel 1. Fyrrverandi sjónvarpstjórin Mikkjal Helmsdal gjørdi í fjør greitt, at so leingi TV2 hevði sjónvarpsrættindini til formel 1, so varð formel 1 ikki sent á SVF, tí signalið hjá TV2 var ov svikaligt.

Jógvan Jespersen svaraði, at føroyingar kunnu byrja at gleða seg, tí SVF hevði gjørt avtalu við TV2, um at senda tær 10 seinastu koyringarnar í ár. Hetta merkir, at fyrsta koyringin, sum SVF sendir, er í Fraklandi 3. juli, og seinasta koyringin er í Kina 16 oktober. Hann segði, at orsøkirnar, til at alt kappingarárið ikki verður sent, eru at kvotur eru á, hvussu nógv tilfar SVF kann senda frá TV2.

**-nud**

## Finaludystur á Rex

Felagið hjá føroyskum Liverpool-fjepparum ger sum vera man nógv burturúr europeisku finaluni millum Milan og Liverpool, sum skal spælast mikukvøldið.

Avtala er gjørd við Rex í Havn, soleiðis at dysturin verður vístur á stórskíggja, og yvir høvur er ætlanin, at talan skal verða um eitt hugnakvøld av teimum góðu. Við at boða frá luttøku undan tiltakinum, er nevnliga eisini møguligt at fáa ein góðan bita undan dystinum, og verður dysturin sjálvur eisini av tí góða slagnum, so er einki at ivast í, at talan alt í alt verður um eina ógloymandi uppliving fyri Liverpool-fjepparar á Rex.

**-jm**